

Poul Klein vaskar á heimferðini



Uttast t.h. Arne Andreassen.Uttast t.v. Gutti í Vík, næstur honum Per í Tjørnuvík og Jógvan Petersen

á við illveðri. Tá var tað eitt rættiligt tørn at fáa alt undan, men tað gekk eisini við hesum raska fólkinum.

### Slitu trossan

Einaferð komu vit soleiðis fyri, at vit mistu ein trossa. Hann slitnaði, tí tað var so nógv í sild. Tað var snópisligt, men vit høvdu fingið nakað væl av sild mestsum ein túr.

Vit vóru millum teir fyrstu saman við "Vón"sum komu at brúka nylongørn. Tann fyrsti sum royndi hetta var snurriváðsbátur í Porkeri. Kjartan Mohr bestilti so gørn til bæði skipini.

Vit fornýggjaðu at byrja við 10 gørn hvønn túrin. Tað var munur á, tí tey vóru løtt at arbeiða, og tey fiskaðu so nógv betri. Tá vit fingu eina kvart tunnu í við hampgørnum, fingu vit eina heila tunnu í við nylongørnum. Tað var heilt gott. Tá liðugt var at draga, skuldi sildin reinsast. Hon var avhøvdað og magadrigin. Síðan varð hon saltað í tunnur. Aftaná at vera sjúnkað eitt sindur, varð tunnan fylt við laka, sum var fult saltmettaður sjógvur. Síðan varð botnur sligin í tunnurnar, og tær vórðu koyrdar í lastina.

### Bushmill og Stavanger

Tað var ofta so nógv toka, men tað var óført, sum John dugdi væl at navigera við Bushbill og Stavanger. Hetta var tann sokallaða Consol skipanin, sum gjørdi tað møguligt at telja seg fram til, hvar skipið var statt við at lurta eftir nevndu støðum. Talt varð upp, hvussu nógv signal støðirnar sendu hvønn minutt, og á einum serligum korti kundi staðfestast, hvar skipið var statt. Seinni fekk henda skipan tann bata, at ein pinnur á radioapparatinum reistist fyri hvørt signal, og hetta gjørdi tað lættari at telja. John kom altíð so púra beinur.

Tað hendi eisini, at vit høvdu útgerð við til onnur skip, og hann peilaði seg til skipini. Peilari var eisini framkomin tøkni tá í tíðini.

### Seinasti túrur við Álaker

Eg minnist serliga til síðsta túr við Álaker. Vit fóru í oktober og eg haldi, at vit komu ikki heim fyrr enn í november mánaði. Tað var so deiligt veður tann túrin. Vit vóru fáir mans. Fólkið var farið av. Vit høvdu bert 400 tunnur við, sum var passaligt at hava í lastini. Vit vóru næstan norður ímóti Jan Mayen. John var uppi um náttina. Vit lógu millum russararnar, men hann manøvreraði seg burtur úr við at brúka skrúvuna. Trupulleikin her var tann, at føroyingar settu gørnini undan vindinum, meðan russarar settu tvørt vindin. Teir komu so nær men vóru kortini hampiligir. Onnur skip tordu ikki at seta millum russararnar, og teir fingu lítið.

Vit koyrdu gørn burtur úr, so hvørt tey skrædnaðu og koyrdu eingi uppí aftur, tí vit høvdu jú ikki so nógvar tunnur. Men vit fingu sild í hvørja nátt, hóast garnatalið kom heilt niður í 40.

Vit fingu uppí tunnurnar og eg haldi, at vit høvdu 10 ella 20 tunnur á dekkinum, sum vit saltaðu í fiskakassar, tá vit fóru at sigla inn. Hetta var síðsti túrur við Álaker, og var hetta í 1961.

Besta árið fingu við 2.600 tunnur av sild. Bert "St Jaques" úr Vági hevði fleiri, men hon var eisini eitt størri skip. Vit fingu eisini góða inntøku.

Tað kann verða nevnt, at hendan veiðan gav nógv arbeiði á landi, har øll sildin skuldi pakkast umaftur og skiljast í støddir og góðsku.

### Vandamikil streymur

Eg kann minnast, at vit einaferð fóru heim við fullum skipi av sild, John var tá við eisini. Eg stýrdi, tá vit komu fyri Leirvík, og tað var norðan. Nú kemur ein streymkurðil, og eg fekk hana ikki upp ímóti fyrr enn mitt á fjørðinum, so trupult var tað at sigla. John segði, at hann var einaferð komin soleiðis fyri, at hann var einsamallur norður eftir við "Álaker". Hann mundi farið á land við Mjóvanes. Skipið var í jaðaranum millum norðurrákið og suðurrákið. Tað var eisini tungt at stýra við ketustýring.

Vit komu einaferð forbí Nevið hesumegni Halgadal. Eg stýrdi sjálvir, tað hevur rikið suður við landinum og norður eitt sindur út frá. Knappliga dreyar hann beint inn ímóti. Ein klaksvíkingur var við tá, sum kendi til tað á Rivtanganum. Tað var gott veður, og tað var atdjúpt eisini. Hann orðnaði beinanvegin at koyra róðrið í borðið og at sigla norðeftir. Um eg var einsamallur, hevði eg sikkurt farið suður eftir.

### Kann bert bera teimum á Álaker alt gott

Ikki eri eg heldur gloymdur á Skipasmiðjuni. Eg fekk fyri kortum heilsan frá Søren Pram Sørrensen, sum enn er har. Hann var tvey heyst við Álaker og var ein "deiligur drongur".

Eg skal bera teimum, sum áttu Álaker við Kjartan Mohr á odda, alt gott. Reiðaríið var gott, og teir spardu ikki útgerð. Men vit spardu okkum heldur ikki, og tí kom eisini so væl burturúr hjá báðum pørtum.

## Manningin á Álaker var sera støðug

Vit endurgeva manningarlistan 1.túrin í 1959. Teir mynstra 21.mars, og er hetta tann túrurin, teir vegna illveður fara beinleiðis inn í Vestmannaoyggjar, og manningin fer at arbeiða íslendskan garnafisk, sum greitt er frá í frásøgnini:

| | føddur | Heimstaður |
|---|---|---|
| John Joensen, skipari, | 10.9.1918 | Oyndarfjørður |
| Andrias Sofus Andreassen, 1.bestim | 1.12.1906 | - |
| Ditlev Houmann, 2.bestimað | 5.4.1916 | - |
| Kristoffur Joensen, motorpa | 5.9.1926 | Eiði |
| Jákup M Joensen, smyrjari | 7.12.1934 | Oyndarfjørður |
| Hans Johannes Gaard, kokkur | 6.10.1915 | - |
| Mejnhard Joensen, lastamaður | 1.12.1916 | - |
| Hans David Davidsen, dekkari | 25.09.1908 | Haldarsvík |
| Hans Jacob Johansen | 28.07.1905 | - |
| Hans Martin Hammer | 9.4.1914 | - |
| Daniel P Henriksen | 19.10.1902 | - |
| Jákup Hendrik Rinkustein | 24.11.1938 | Oyndarfjørður |
| Jógvan Petersen | 16.7.1937 | - |
| Poul Garðshorn | 17.6.1936 | - |
| Jóhannes Brúðarfoss | 28.3.1911 | Hellurnar |
| Jacob Høgnesen | 18.4.1931 | - |
| Anthon Jacobsen | 25.7.1911 | Fuglafjørður |



Jákup Martin Joensen saman við konuni Magdalenu th. og systir hennara Petrinu. Jákup Martin var við Álaker og saman við Andrias øll árini. Jákup Martin var beiggi John skiparain, og teir vóru fýra beiggjar við. Jákup Martin var eisini við "Víkingini", sum vit umrøða í komandi og seinasta parti. Myndirnar frá "Álaker" hava vit lænt frá Jákup Martin og takka vit honum fyri beinasemið. Hann letur sera væl at Andrias sum skipsfelaga, eins og allir aðrir av hansara skipsfeløgum hava gjørt



Pól Garðshorn var eisini við Álaker. Her er hann saman við Jóhannu í 100 ára føðingardegi hjá Andrias. Pól var ein av teimum, sum ikki fekk kekkin útloystan í Reykjavík, og har menninir gjørdu bart

Sosialurin